# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um mammu mína

# Ketty Kjærbo

**f. 27. mai 1924, d. 28. februar 2009**

Leygardagin 28. februar 2009 andaðist mamma okkara 84 ára gomul. Ein megnar kvinna. Hevði saman við pápanum uppalt okkum 7 systkin, sum øll komu væl avstað.

Pápin var sjómaður, fór avstað um várarnar og kom aftur um heystið, so tað var mamman sum syrgdi fyri, at eplini komu í jørðina og grasið bleiv til hoyggj.

Vit høvdu kúgv, og gekk mamman saman við øðrum konum til neytar. Fari var frá húsum tíðliga á morgni við 3 og 4 dyllum á rygginum og varð aftur fari avstað um kvøldið. Tað vóru nokk ikki altíð løtt spor, men viljin dreiv verkið. Tann dagligdagurin er ein farin tíð.



Mammu dámdi væl at hava síni rundan um seg, og tann sum hevur búð og verið inni har, hevur kent hennara fjálgu hendur. Hon spardi seg ikki at hjálpa, hvar og nær tað var.

Ommu- og langommubørn hevði hon nógv, og stóran áhuga hevði hon fyri, hvussu teimum gekst.

Mamman og pápin høvdu sett sítt álit á Jesus, og gjørdu tey sítt til at vísa øllum sínum á Hann.

Pápin doyði í 1994 og ein sonur teirra í 1996. Hetta var tungt hjá mammuni. Friður verið við minnunum um pápan og Sommer.

Eftir at hava sitið einkja í 12 ár, møtti mamman Magnus Paula Johannesen úr Vestmanna. Tey giftust og fingu 4 góð ár saman.

Leygarmorgunin, sum mamman andaðist seinnapartin, var ein dagur sum vit børn, ommubørn og familja annars, sum vóru tilstaðar, upplivdu sum nakað heilt serligt. Mamman var púra klár og segði okkum, at nú fór hon at fara heim til Harran og bað hon heilsa ommubørnunum, sum ikki vóru har, at hon nú fór heim til Jesuspápan. At uppliva, at hon sá inn í dýrdina, og óttaleys legði eyguni saman og sovnaði, gjørdi annars tungu løtuna, heilt serliga.

Góða mamman, nú hevur tú lagt árarnar inn, og nú hvíla tínar troyttu hendur. Takk fyri alt.

**Dóttir tín Sanna**

## Andlát og jarðarferðir

**Katrin Nicolaisen, Vestmanna**, ættað av Torlabrúgv í Haldórsvík andaðist á Eldrasambýlinum í Vestmanna sunnudagin 3. mai, 93 ára gomul.

**Signi Nielsen**, ættað úr Leirvík, andaðist á Ellisheimium í Havn sunnudagin 3. mai, 90 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 6. mai kl. 12.

**Erik Lund Eriksen** úr Havn andaðist fríggjadagin 1. mai, 64 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin kl. 13.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Janus Kamban**
myndahøggari
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum
leygardagin 2. mai, 95 ára gamal.
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
mikukvøldið kl. 18.00
Jarðarferðin verður úr Havnar Kirkju
hósdagin kl. 13.00.

# Realskúlanæmingar í 1964

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin fyri 45 árum síðan, í 1964. Realskúlanæmingar eru til fráfaringarnátturða inni hjá Frøken Cohr, lærara, sum búði í húsunum við síðuna av realskúlabygninginum.

Á myndini eru f.v.: Vigga Cohr (Frøken Cohr), Torfinn Hansen, Dagbjartur Johansen, Herluf Lützen, Eivind Dalsgaard og Lis Djurhuus.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 483).

*Myndaeigari: Jógvan Christiansen*



# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum ið sýdnu okkum samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma, langomma og kona

**Ketty Kjærbo**
Skopun

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri góð orð og sangir í Kapellinum og í Betania.
Takk til øll sum hjálptu til við ervinum og jarðarferðini.
Takk fyr blómur, kransar og gávur til Betania.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Blíðar heilsanir*
**Børnini við familju og Magnus Pauli**

## 25 ára starvsdagur

Í dag 5. mai hevur Daisi Petersen arbeitt sum skrivstovukvinna í 25 ár hjá elfelagnum SEV í Klaksvík.



# Tøkk

Hjartans takk til tykkum mongu, sum mintust meg á 80 ára føðingardegnum.
Harrin signi tykkum øll.

**Kærar heilsanir**
**Heinina Joensen, Sandavágur**

## Dagurin

**5. mai. Gotthard**, deyður í 1038. Hann var abbati og biskupur í Hildesheim. Týskt navn, samansett av orðunum fyri Gud og harður.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta*